Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard

**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Norðurlond og umheimurin

## *Oddagrein*

Í hesum døgum verður ein frágreiðing frá einum sokallaðum Vísmannabólki almannakunngjørd. Vísmannabólkurin telur umboð úr øllum Norðurlondum, og her eisini Føroyum. Ætlanin er, at Vísmannabólkurin skal leggja fram til orðaskifti frágreiðingina á komandi Norðurlandaráðsfundinum, sum verður í Íslandi um ein mánað.

NÚ vita vit ikki í skrivandi løtu so nógv um innihaldið í hesi frágreiðing, men útvarpið visti at siga frá mánamorgunin, at Vísmannabólkurin kemur til ta niðurstøðu, at Norðurlond mugu til at orða ein felags politikk mótvegis eitt nú Europasamveldinum, ið um ikki so langa tíð eisini fer at fevna um fleiri av eystureuropeisku londunum.

VÍSMANNABÓLKURIN hevur eftir øllum at døma eina greiða støðu til ES og ljóðar hetta skilagott. Ikki tí at tað er rætt at isolera seg ella at standa uttanfyri felagsskapir av ymsum slag. Men tað er týdningarmikið, at Norðurlond, sum jú longu eru „splittað" við at nøkur eru í ES og nøkur uttanfyri, draga eina felags línu í tí, sum júst eyðkennir Norðurlond sum nakað serstakt. Her verður bæði hugsað um mentan og annars samfelagsligar dygdir, sum í stóran mun hava verið sermerktar fyri júst Norðurlond. Hvussu oftani verður ikki víst til Norðurlendska vælferðarmodellið og hvussu mong brúka ikki hetta modell sum fyrimynd fyri framtíðar samfelagnum!

TAÐ var tann tíð, tá norðbúgvar kendu seg sum norðbúgvar, tvs. nakað fyri seg. Tað varð tosað um at skipa Norðurlond sum ein felagsskap av londum, sum kanska kundi minna um ES ger tað á summum økjum. Men sohvørt fleiri av Norðurlondum fóru uppí ES fjarðaði hesin dreymur burtur, tó so at vit í dag hava Norðurlandaráðið, ið skal bæði raðfesta og staðfesta tann norrøna samleikan. Ymsar meiningar eru um, hvussu væl hetta hevur eydnast. Nú verður so vónandi lagt upp til, hvussu vit kunnu leggja nakað meira ítøkiligt í henda samleika og hvussu vit menna okkum sum eitt mentanarligt øki mótvegis umheiminum.

ÁHUGAVERT verður at síggja, hvat Vísmannabólkurin mælir til á hesum øki. At hann leggur stóran dent á norrøna samleikan og at fáa Norðurlond at kenna seg sum eina mentanarliga og samfelagsliga eind er bæði gott og rætt. Londini goyma so stór virði, at hesi mugu ikki missa fótafestið í tí meldrinum, sum fer at koma í kjalarvørrinum á einum risastórum samveldi í Europa - eftir amerikanskari fyrimynd. Sjálandi skulu vit heldur ikki gerast nalvaskoðarar og bara síggja Norðurlond sum svarið uppá tað einasta rætt og besta. Lýti eru allastaðni. Men tað ræður um at hjúkla um og virðismeta tað góða vit hava sum norðbúgvar, ikki minst við tí fyri eygað, at vit við at standa saman og kenna okkum sum eina eindu, harvið eisini kunnu tilføra umheiminum nakað gott á so nógvum ymsum økjum. Ikki minst demokratiska hugsjónin og sosiala medvitið eru virði, sum vit við røttum kunnu borðreiða fyri umheiminum.

Tað áhugaverda er, at Norðurlendska vælferðarmodellið ikki bert kann vera góður íblástur hjá tilafturskomnum londum, men kann tað so sanniliga eisini hjá framstandandi tjóðum sum eitt nú USA. Eitt nú kundu amerikanarar lært nógv av okkara hugburði eitt nú mótvegis deyðarevsing - og annars ikki minst á tí sosiala økinum.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Fiskirættindi føroyinga verða framvegis høvuðsálitið

**At nakrir fáir á lógligan hátt gera sær dælt av minkandi veiðimøguleikum og ríka seg sjálvar upp, heldur enn at hugsa um heildina, má steðgast beinanvegin.**



Jákup Egholm Hansen hevur grein í bløðunum í seinastu viku, sum fær fólk at undrast, tí hesin maður er ikki hvør sum helst, men formaður í einum sera týðandi føroyskum reiðarafelag, nevniliga tí hjá rækjuflotanum.

Var tað hvør sum helst, so kundi tú halda, at hann hevði miskilt kjakið, sum tíbetur er byrjað um skipan av fiskiríkidøminum hjá Føroya fólki.

At formaðurin hjá rækjumonnunum letur lesaran skilja, at áskoðanirnar hjá formanninum í búskaparráðnum og hjá Føroya Javnaðarflokki vóru eins og tær somu, líkist meira manipulatión enn veruligum vilja til eina sakliga viðgerð av einum sera álvarsomum máli.

Tað er als ikki so, at Javnaðarflokkurin ætlar at leggja avgjald á fiskiloyvi ella selja tey til hægstbjóðandi. Hetta er als ikki tikið upp á tungu í javnaðarhøpi.

Veruleikin er, at tað almenna hevur latið fiskiloyvi til ymisk reiðarí fyri á besta hátt at gagnnýta tað ríka tilfeingi, sum er lívsgrundarlagið hjá okkum øllum føroyingum. Hesi loyvi skuldu sjálvsagt latast fiskimonnum og skipum, sum hava besta møguleikan at gagnnýta fiskigrunnarnar, og tað eru tey í flestum førum. At tey so verða latin fyri einki, ger rakstrarmøguleikarnar hjá flotanum bara betri, og tað skuldi so eisini komið okkum øllum til góðar.

Men nú koma vit til tað, sum ikki er sambæriligt við andan og góða viljan omanfyri. Tí summir av hesum, sum fingu álitið frá Føroya fólki at gagnnýta okkara felags tilfeingi, misbrúka álitið. Ístaðin fyri at fiska, leggjast teir á fiskirættindini, sum teir fingu fyri einki, leiga tey út til aðrar fyri nógvar pengar ella selja tey fyri okursprís. Altso ta álit, hesir menn fingu, brúka teir nú til at pumpa pening úr eini fiskivinnu, sum frammanundan hevur tungt við at klára seg.

Tað er júst hetta, sum ger tað dýrt og ómøguligt hjá framtakshugaðum, ungum føroyingum at fara til verka, tí áðrenn teir sleppa ígongd, skulu teir (ikki gjalda til tað almenna fyri fiskirættindi, men) gjalda í dýrum dómum til nakrar, sum fingu rættindini fyri einki. Summir eru enntá so grammir at vinna sær pening av fiskirættindunum hjá Føroya fólki, at teir lata aðrar tjóðir fara avstað við loyvunum fyri pening, sum fer í teirra egna privata lumma.

Tað eru hesi viðurskiftini, Javnaðarflokkurin vil fáa eitt kjak í lag um. Spurningurin er als ikki at køva nakran bjartan neista, men ansa eftir, at tilfeingið, sum Føroya fólk eisini í framtíðini skal liva av, verður so rættvíst og skilaliga skipað, at tað kemur øllum fólkinum til gagns.

Tað er neyðugt at lóggáva so, at freistingin á lógligan hátt at misbrúka álitið ikki heldur fram, men at fiskiloyvini, givin eru og vónandi fara at vera givin í framtíðini, fara at koma øllum fiskimonnum, reiðarum og øllum Føroya fólki til mesta gagn.

**Hans Jørgensen**

# Til Elin Lindenskov!

Jeg tillader mig at komme med en lille bemærkning til den email du har sendt til mig, og sikkert også en masse andre, nu op til byrådsvalget.

Det er godt, at du arbejder frem imod at få pasningsordninger til alle børn! Jeg har selv stået i situationen 2 gange, at skulle på arbejde efter endt barselsorlov, uden at have nogen dagpleje eller daginstitutionsplads til børnene. Jeg ville hellere end gerne være blevet hjemme og passe børnene selv, indtil de blev 2-3 år, men det tillod økonomien ikke.

Situationen er nu den, at jeg er en af de *heldige*, som har fået begge mine børn i daginstitution. Begge fik plads da var omkring 1 år. Selv om jeg har fået mine problemer løst, har jeg dog ikke glemt den fortvivlede situation, og er derfor glad for, at der er nogen som orker at fortsætte med at kæmpe.

Jeg har dog nu fået et andet problem, som jeg vil bede dig have i erindringen:

Begge mine børn er i Dagstovnurin í Hoyvík, som (synes jeg) er den bedste institution i kommunen. God beliggenhed i naturlige omgivelser. Indretningen er praktisk med vuggestue og børnehave i hvert hus, hvorved overgangen ikke føles så drastisk, når børnene flyttes op. Ligeledes kan søskende have megen glæde af hinanden. Personalet er vi også meget tilfredse med, men .......

**PROBLEMET ER**: at institutionen har alt for få penge at arbejde med, hvorfor **antallet af personale er skåret ned til et minimum**! I min datters børnehave er der to voksne til 15 børn! Det kan til nød gå nogle dage, men bliver A syg, er B alene tilbage med 15 børn, og hun må måske arbejde fra 7.30 til 17.00. Når så A bliver rask, skal B afspadsere al overtiden, og så er A alene tilbage med 15 børn! Så kører den onde cirkel. Personalet bliver så nedkørte og pressede, at de ikke orker at være aktive sammen med børnene, hvilket jo egentlig også er en fysisk umulighed. Selvfølgelig gør institutionen hvad den kan, og personalet hjælper hinanden på tværs af stuerne, men .... det er jo blot at flytte problemet!

Jeg er ikke altid tryg ved at aflevere min børn, under disse omstændigheder! En daginstitution er i mine øjne ikke blot et sted hvor jeg kan „komme af med mine børn". Det skulle gerne være et sted, hvor de først og fremmest er trygge, men også får mulighed for at opleve og lære om nogle ting, som jeg ikke til dagligt har tid eller mulighed for. Du skriver selv, at børn skal have tilbud om „udviklende" pasningsordninger! Som ressourcerne er nu, er institutionen blot et sted hvor børnene kan *være*, mens jeg er på arbejde! Der er ikke ressourcer til udviklende aktiviteter!!!!!! Ikke et ondt ord om personalet, de gør virkeligt hvad de kan, men - **de kan ikke mere**!!!!!!

Næste problem er så, at de efterhånden har opsparet så megen overtid, at institutionen er nødt til at lukke mellem jul og nytår (ligeledes 3 uger om sommeren) for at personalet kan afspadsere. Det sætter mange af os forældre i en slem knibe, for det er ikke altid muligt at få fri fra arbejde lige i disse dage. Vi er jo mange som har børn i pasningsordninger, og vi kan naturligvis ikke alle holde ferie samtidig. Der er mange virksomheder, som ikke bare kan lukke og holde ferie, enten af økonomiske eller af kundemæssige hensyn! Hvis man da ikke har familie som kan træde til og passe børnene, hvad gør man så?

**Du argumenterer med, at 100% børnepasning er en betingelse for en by i udvikling, hvor trivslen er i fokus! Jeg er ikke enig! Hvis fokus på kvantiteten går forud for kvaliteten, så kan du have 110% pasningstilbud om det skal være. Det skaber ikke trivsel og udvikling for børnene, hvis der hverken er økonomiske eller menneskelige ressourcer nok til at børnene kan blive passet og aktiveret på en tryg og udviklende måde. Venligst hav dette i erindring, i dit fremtidige arbejde!**

Med venlig og håbefuld hilsen

**Helle T. Johansen**
**Hoyvík**

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**



# Norrøna fingið útbygning

*Tá havnarfólk skoðaðu Norrønu í morgun, vóru nøkur heldur skakk, tí skipið var heldur margháttligt á at líta við stórum útbygningi aftast á skipinum*

Stefan í Skorini

Sagt verður av Smyril Line, at bygt er uppí fyri at skipið skal vera støðugari undir sigling. Hetta munnu nøkur okkara, sum eru ring í sjóverki, gleða okkum um.

Skipið hevur fingið ein útbygning aftast, og hann er festur frameftir síðunum. Orsøkin til útbygningin er altjóða krøv, sum verða sett øllum ferðamannaskipum.

Hetta er tó ikki einasta broytingin við skipinum, tí onnur krøv altjóða vórðu eisini sett. Gjørd eru tvey vatntøtt skott á bildekkinum, so at bildekkið nú er í trimum deildum. Um vatn kemur í eina av deildunum ber til at forða fyri, at tað eisini kemur í hinar báðar, tí skottini eru vatntøtt.

Arbeiðið er gjørt í Danmark á skipasmiðjuni í Fredricia.



*Norröna er umbygd á skipasmiðju í Fredericia. Hetta er gjørt, tí at altjóða trygdarkrøv verða sett ferðamannaskipum*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Íslendingar veitt mest í september

*Íslendingar eiga nógv tann størsta partin av útlendsku veiðuni í føroyskum sjógvi í september. 29.100 tons av føroyskum fiski eru farin um lúnningina á íslendskum skipum í farna mánaða*

Stefan í Skorini

Íslendsk skip hava bara fiskað svartkjaft í ár, og næstan helmingurin av samlaðu veiðuni hjá íslendingum í ár er fingin til høldar í september. Íslendsk skip hava fingið 69.300 tons í ár, harav 29.100 tons í farna mánaða.

Samlaða veiðan hjá útlenskum fiskiførum í september er 33.487,7 tons. Íslendingar eiga nógv tann størsta partin, meðan russar hava fiskað næstmest. Russar hava veitt 2393,7 tons av svartkjafti, og hetta er eisini samlaða veiðan hjá russiskum skipum í september umframt fimm tons av kongafiski.

Skip úr ES-londum hava veitt 1989 tons í føroyskum sjógvi, meðan onnur skip hava fingið 31498,7 tons í september. Av skipunum úr ES-londum hava donsk fiskifør fiskað mest. Teirra veiða er 1545 tons, og tað er alt svartkjaftur.

Restina eiga Bretland og Frankaríki, sum hava fingið ávikavist 194 og 250 tons. Størsti parturin av fronsku veiðuni er langasporl, sum teir hava fingið 148,8 tons av. Størsti parturin av veiðuni hjá bretskum skipum er 61,8 tons av kongafiski. Restin er fyri tað mesta upsi, svartkalvi, flat fiskur og langasporl.

Íslendingar hava havt flestar fiskidagar í september. Í 206 dagar hava teir veitt 29.100 tons. Russar hava havt 55 fiskidagar. ES-londini hava havt 162 fiskidagar tilsamans. Bretland eigur teir 78, meðan Frakland hevði 64 og Danmark 20.

Veiðan hjá útlendskum fiskiførum er nú komin uppá 225.373,6 tons í ár, og nýttir eru tilsamans 5215 fiskidagar. Av samlaðu veiðuni eru 200.636,7 tons svartkjaftur.

ES-londini eiga 19.724,1 tons, meðan onnur lond eiga 205.649,5 tons. Russar hava fiskað mest í føroyskum sjógvi, og teirra skip hava fingið 89.307,3 tons. Næstir teimum eru íslendingar við 69.300 tonsum, og norðmenn hava fingið 46965,9 tons í føroyskum sjógvi í ár.

Hevur tú kannað rentuna?




Seinastu 12 mánaðirnar hevur íløgufelagið Altjóða Partabrøv hjá Kaupthing givið 54% í rentu og seinastu trý árini 113%. Nú kanst tú, sjálvt við fáum túsund krónum, gera íløgur í virðisbrøv. Støkk inn á gólvið hjá okkum ella einari av deildunum hjá Føroya Sparikassa og fá meiri at vita.

Rentan er roknað í tíðarskeiðunum fram til 1. september 2000. Søguligur vinningur er ikki trygd fyri framtíðar vinningi.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355